Campingplássið Yviri við Strond

Tórshavnar býráð lýsir við hesum eftir áhugaðum ið vilja átaka sær at reka campingplássið Yviri við Strond komandi summar.

Býráðið hevur ikki fastlagt treytirnar í samband við raksturin, men hugsar sær at hesa kunnu verða nærri avtalaðar við tann persón, tey hjún, tað felag ella tann stovn, ið átekur sær raksturin.

Campingplássið má tó vera opið frá miðjun juni til miðjan sept. til vanligar tíðir á degnum umframt at tað má vera opið, tá ið ferðamannaskipini koma og fara.

Býráðið fer nú undir at gera campingplássið í stand til summarið og býður møguligum áhugaðum at venda sær til býráðið við umsóknum um at reka campingplássið.

Í umsóknini eigur at vera greitt frá, hvussu campingplássið ætlast rikið og hvørjar treytir, ið verða ynsktar.

Tórshavnar býráð

Íbúð ynskist í Keypmannahavn

Er tað nakar, sum hevur ella veit um eina íbúð nærhendis Keypmannahavn, sum er til leigu, so eru vit hugað at leiga hana beinanvegin — fyribils í eitt ár.

Tlf. 47985
ella 47217

Skrivarastarv

Søkt verður eftir skrivara til Føroya Postfelag.

Arbeiðstíðin verður fyribils hálvan dag.

Skrivlig umsókn við møguligum prógvum skal sendast til

Føroya Postfelag
Posthúsið 3800 Tórshavn

Hotelverilsir

í samband við fiskivinnustevnuna í Aberdeen

Í samband við at Ídnaðarfelagið skipar fyri føroyskari luttøku á fiskivinnustevnuni »Catch 82« í Aberdeen í døgunum 23.—26. juni hevur felagið bílagt nøkur verilsir. Eini 15 eru enn tøk.


Áhugaði verða biðin um at venda sær til Ídnaðarfelagið tlf. 13028 sum skjótast.

Føroya Ídnaðarfelag

Havnar Fimleikafelag

hevur framsýning við teimum eldru liðunum í Ítróttarhøllini í Vági, sunnudagin 4. apríl kl. 15,00.


Havnar Fimleikafelag



HELLU-HÚSIÐ

— besta loysnin


- **skilagóð innrætting.**
- **kappingarførir prísir**
- **skjót uppseting (elementir)**
- **spardar byggirentur**
- **háisolerað (lítil oljunýtsla)**




Sjálvandi geva vit eisini tilboð uppá »sjálvteknað« hús.

Arkitektar, verkfrøðingar og byggifólk annars geva hesum besta ummæli.

Óbindandi tilboð verða givin, ikki bert til sethús, men til alla bygging.



Pf. Hella Tórfinsgøta 41 - tlf. 16477 - 3800 Tórshavn



FALDHURÐIN

FLEXI

Faldhurðin sparir um plássið
Faldhurðin er orkusparandi
Faldhurðar kunnu fáast til eitthvørt endamál
Faldhurðin verður framleidd í ymiskum træ, eins og í ymiskum litum í kunstleðri
Faldhurðin er bíligari í standardstøddunum 205 × 73 cm, 205 × 83 cm og 205 × 93 cm.

Prísir og lýsingarblað fáast við at venda sær til

Svend Krosstein

Telf. 146 00 Tórshavn